















# Nærri sleppur tú ikki

Frálíku húsini standa so nær sjónum og bátahylinum á Argjum, at tú sleppur ikki nærri. Tey hava eisini frálíkt útsýni inn yvir Havnina og út á fjørðin. Tú fært straks varhugan av, at hetta er nakað serligt.

**Fyrsta fatanin**
Tú sært ikki alla útsjóndina á húsinum við tað sama, tí tey eru gyrd inni við einum stórum rimagarði, so tú fært frið at vera inni hjá tær sjálvum, hóast tú ert í bygdum øki, og tú kanst njóta ljósið og sólargangin.

**Urtagarður og umhvørvi**
Urtagarðurin er býttur upp í trý – innkoyring, ovara síða og niðara síða. Ovara síða vendir móti sólini. Har er gyrðing rundan um og innilokaður garður við útigólvi, grasplenu og runnum, so har kanst tú fáa heilt frið til at njóta løturnar við góðum veðri og útilívi.

Niðara síða vendir móti bátahavnini, og har er stoyptur garður og rimagarður.

**Ljós og luft - inni og úti**
Húsini eru arkitektteknað við stórum vindeygum móti ljósinum, so tú kanst eisini sita inni í stovuni og njóta urtagarðin uttanfyri. Annars er frítt fyri allan vegin runt, og grundøkið er heilar 1037 fermetrar, so har er gott pláss. Í hinum endanum er frálíka alrúmið / stovan við frálíka útsýninum yvir bátahavnina og út á fjørðin. Sama útsýni er úr køkinum. Húsini standa í friðarligum og veðurgóðum umhvørvi og hava eitt heilt einastandandi gott útsýni oman í bátahavnina, út á fjørð og inn yvir Havnina.

**Stílur og snið**
Tú fært alt fyri eitt varhugan av, at húsini eru væl bygd. Høgt er til loftið og nakrir av bjálkunum eru sjónligir. Húsini eru dagførd og væl hildin, og nærum alt er gjørt av nýggjum innan í ovaru hædd. Húsini eru stór og rúmlig, men eisini hugnalig og fjálg. Í stovuni er opin múraður eldstaður, har ein brenniovnur er bygdur inní.

**Niðasta hædd**
Í niðastu hædd eru eisini gott pláss. Har er sjálvstøðug inngongd, og lætt er at gera eina íbúð. Annars eru fleiri kømur og góð goymslurúm.

**Bilskúrur**
Til ognina er stórur dupultur bilskúrur og annars er stórt øki at seta bilarnar á – vaska og halda við líka. Einir seks bilar kunnu standa í túninum, men annars er stórt p-pláss beint við. Skúli, barnagarður og busssamband er nær við, og handil er beint við síðuna av.

**Innrætting**
Í neðra er inngongd, durur, gongd / hall, millumgongd / goymslurúm, baðirúm, stova / kamar, inngongd / gongd, fýrrúm, kamar, kjallararúm, goymslurúm við garaguportri. Í erva er uppgongd, køkur / alrúm / borðsstova, stova / hugnastova við eldstaði / brenniovni, millumgongd, hjallur, alrúm / arbeiðsrúm / stova, baðirúm, hjúnarrúm við egnum baðirúmi við brúsu og gosbað, 2 stór kømur.

**Fakta**
Argjavegur 6, Argir
Byggiár: 1970
Hæddir: 2
Gólvvídd: 386 fermetrar
Grundøki: 1037 fermetrar
Hjallur: Ja
Bilhús: 33 fermetrar
Prísuppskot: Húsini verða seld, um hóskandi boð fæst

P/F inni • Niels Finsens Gøta 37
P.O. Box 364 • FO-110 Tórshavn
inni@inni.fo • Tlf. 320 410 • Fax 320 510
inni